STUTT SAGT

## Misnøgd hóast framburð

Í morgin og leygardagin er tjóðartingsval í Kekkia, og tá skulu veljararnir taka støðu til, um tann sosialdemokratiski forsætisráðharrin, Jiri Paroubek, skal halda fram, ella um tann konservativi Mirek Topolanek skal loysa hann av. Sosialdemokratarnir hava stýrt Kekkia síðani 1998, men Panoubek hevur bara sitið eitt ár sum stjórnarleiðari.

Tað hevur verið bæði kalt og vátt í Kekkia í seinastuni, men tað politiska valstríðið hevur verið ógvuliga heitt. Týsdagin varð eitt valevni hjá sosialdemokratunum sligið niður á einum veljarafundi í Böhmen, og tað sama er hent tveimum valevnunum hjá kommunistunum.

Tað hevur gingið væl búskaparliga í Kekkia tey seinastu árini. Í fjør var vøksturin í búskapinum seks prosent, og fyri fyrstu ferð hevði landið avlop í handlinum við umheimin. Kortini eru nógvir kekkar misnøgdir við ta politisku leiðsluna, og tí er tað ikki óhugsandi, at landið fær eitt politiskt skifti. Veljarakanningar upp undir valið í morgin og leygardagin hava bent á, at tað fer at standa á jøvnum ímillum stjórnarsamgonguna og andsrøðuna.

## Misbrúka teir fremmandu

Seinastu árini eru nógvir handverkarar komnir úr Baltalondunum og Pólandi til Noregs at arbeiða. Leingi hevur ljóðað, at teir fáa ikki somu løn sum teirra norsku starvsfelagar, og nú avdúkar ein nýggj kanning, at teir fremmandu handverkararnir fáa heldur ikki somu trygd á arbeiðsplássunum sum teir norsku.

- Tað eru teir, sum verða koyrdir upp á tær hægstu tekjurnar og niður í tær djúpastu gravirnar uttan nakra trygd, sigur eitt starvsfólk hjá arbeiðseftirlitinum við blaðið Dagsavisen. Hann sigur seg eisini hava sæð polskar handverkarar arbeiða á einari asbesttekju, uttan at teir høvdu nakra verju, sum reglurnar annars krevja.

Arbeiðseftirlitið í Oslo hevur kannað, hvussu umstøðurnar hjá fremmandum handverkarum eru á byggiplássum í býnum. Í einum føri vísti tað seg, at ein polskur handverkari hevði fingið skaða undir arbeiði, men arbeiðsgevarin setti hann av við eina bensinstøð við teimum boðum, at hann mátti klára seg sjálvan.

## Vænta níggju ódnir

Amerikanskir veðurfrøðingar royna av øllum alvi at kanna, hvussu veðrið fer at skikka sær í summar og í heyst, og tað eru serliga tær árligu ódnirnar uttan úr Atlantshavinum, sum hava áhuga.

Herfyri kunngjørdu nakrir veðurfrøðingar, at teir vænta sjey ódnir í Karibiska Havinum í heyst, men nú siga starvsfelagar teirra á lærda háskúlanum í Colorado, at teir vænta 17 tropiskar stormar, og at níggju teirra fara at menna seg til ódnir við vindferð upp í 177 kilometrar um tíman.

Tað hava ongantíð verið so nógvar tropiskar ódnir sum í fjør. Tann ringasta var Katrina, sum herjaði amerikonsku suðurstrondina, har hon kravdi umleið 1.300 mannalív og gjørdi ovurhonds stóran skaða í New Orleans og aðrastaðni.

## Bjørn við rúsevni

Tollararnir í Stuttgart í Týsklandi steðgaðu fyri nøkrum døgum síðani einari 15 ára gamlari gentu, sum var á veg við snartokinum úr Niðurlondum til Sveis, og hon er nú skuldsett fyri rúsevnissmugling.

Gentan hevði eina lítla bjørn av tí slagnum, sum smábørn plaga at spæla sær við. Tollararnir hildu, at gentan var í so stór til at spæla við bjørnina, men gentan greiddi frá, at hon hevði keypt hana til eina yngri skyldgentu. Tá tollararnir vildu sleppa at síggja bjørnina, varnaðust teir, at hon var seymað saman framman, og at hon var dekan ov tung. Illgrunin vísti seg at vera beinur, tí inni í bjørnini funnu tollararnir 72 pakkar av rúsevninum kokain.

Týska løgreglan sigur, at kokainið er næstan 400.000 krónur vert á gøtuni. Gentan hevur greitt frá, at hon skuldi ikki brúka tað sjálv, men at hon hevði fingið 15.000 krónur fyri at taka tað við sær til Sveis.

UTTAN ÚR HEIMI

# Hillary stillar uppaftur



*Hillary Clinton heldur takkarrøðu eftir uppstillingina í gjárkvøldið*

**Hillary Clinton kann vera næstan vís í, at hon verður afturvald sum senatorur í New York**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri góðum fimm árum síðani bleiv Hillary Clinton vald í amerikanska Senatið sum senatorur í New York, og tað er eingin ivi um, at hon verður afturvald á valinum í heyst.

Í gjárkvøldið tók hon av tilboðnum frá demokratunum um at stilla uppaftur, og meiningakanningar vísa, at hon fer at vinna greiðan sigur á republikanarunum. Tað er ikki greitt enn, hvørjum hon skal kappast ímóti, tí republikanararnir hava ikki kosið sítt valevni enn. Tað kann henda, at valið kemur at standa ímillum tvær kvinnur, tí summir republikanarar ætla at stilla Kathleen McFarland upp, men alt bendir tó á, at tað verður fyrrverandi borgarstjórin John Spencer.

Í takkarrøðu síni í gjárkvøldið fanst Hillary Clinton hvassliga at stjórnini hjá George W. Bush og republikanska meirilutanum í Kongressini, men hon segði ikki eitt orð um, hvørt hon ætlar sær at stilla upp á forsetavalinum um tvey ár ella ikki. Meiningakanningar hava annars víst, at hon kann eisini vinna tað valið, stillar hon upp.

# Afghanar hata útlendingar

**Amerikanski herurin sigur, at hermenninir skutu í sjálvverju, tá teir skutu eftir fólki eftir eina ferðsluvanlukku í Kabul mánadagin, men afghanskir politikarar vilja hava málið kannað til botns.**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri fyrstu ferð síðani Taliban-stýrið fall, eru stríðsvognar at síggja í afghanska høvuðsstaðnum Kabul, og umleið 2.000 alvápnaðir hermenn standa á varðhaldi í gøtunum í miðbýnum.

Afghanar eru í øðini inn á teir útlendsku hermenninar í landinum, og serliga amerikanararnir standa fyri skotum. Orsøkin er, at amerikanskir hermenn skutu eftir sivilfólki aftan á eina ferðsluvanlukku í býnum mánadagin, tá ein lastbilur hjá amerikanska herinum rendi á nakrar parkeraðar bilar. Sjálv ferðsluvanlukkanj kostaði fimm afghanum lívið, men tá avtornaði, høvdu 14 fólk latið lív, og fleiri máttu á sjúkrahús við skotsárum.

– Amerikanararnir skutu ósek fólk, og vit fara at hevna drápini, sigur eitt eygnavitni við tíðindastovuna AP. Amerikanski herurin heldur uppá, at hermenninir skutu bara upp í luftina, men afghanskir løgreglumenn siga við bretska blaðið The Guardian, at hermenninir skutu eisini eftir fólki, sum vóru í øðini um ferðsluvanlukkuna. Ein amerikanskur heryvirmaður, Tom Collins, sigur við AP, at skutu amerikonsku hermenninir eftir fólki, so var tað í sjálvvverju. Men ta frágreiðingina góðtaka afghanskir politikarar ikki, og tjóðartingið hevur kravt, at málið verður kannað til botns.

Eygleiðarar í Afghanistan siga, at tilburðurin hevur fingið afghanar at leggja hatur á alt, sum er útlendskt. Í gjár vórðu tríggjar kvinnur funnar deyðar har norðuri í landinum. Tær vóru afghanskar, men arbeiddu fyri altjóða hjálparfelagsskapin Action Aid.

Veksandi mótstøðan í Afghanistan kemur USA illa við, tí amerikanski herurin er eisini sera illa umtóktur í Irak, eftir at tað er komið fram, at amerikanskir hermenn skutu 24 óvápnað sivilfólk, teirra millum fleiri børn, í býnum Haditha í november í fjør. Málið verður kannað, og í morgun segði ein talsmaður hjá herinum, at tað er greitt, at hermenninir søgdu ikki sannleikan, tá teir greiddu sínum yvirmonnum frá tí, sum var hent í Haditha.